# Advokatfelagið við Strond 4 Í/F

JÓGVAN P. LASSEN
PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN
ANNA DAM
INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN
JULIANNA KLETT

Fiskimálaráðið
Att: Rógvi Reinert, aðalstjóri
Yviri við Strond 17
100 Tórshavn

Tórshavn, 19. november 2018
JPL/tdl j.nr. 1741802
Tórunn D. Lassen beinl. +298 203059
tdl@lawfirm.fo

**Viðv.: Tykkara máli nr. 18/00243-6 menningarkvota til P/F Vørðustíggjur**

Vísandi til skriv tykkara frá 15. november 2018, so loyvir undirritaði sær við hesum at venda aftur til málið.

Sum longu gjørt vart við í skrivi mínum til Fiskimálaráðið 25. oktober 2018, so má staðfestast, at samstarvið við P/F Sandoy Seafood ikki kemur í lag, ið merkir, at tann eina treytin fyri hvar avreiðast skuldi, ikki kann verða uppfylt, meðan hin treytin um at landa í Hvalba, framvegis er aktuell.

Viðvíkjandi Skopun, so lá í kortunum, at ein minni tillaging skuldi fara fram í Skopun – broyting av frystarum – og vildi virkið aftaná broytingina kunna tikið ímóti einari minni nøgd.

Uppá fyrispurning meta mínir klientar, at virkið í Skopun, eftir at tillagingin var gjørd, hevði kunnað tikið uml. 20 tons av 100, meðan restin - tey 80 tonsini - kunnu verða landað til Hvalba.

Við atliti at hesi støðu, loyvi eg mær at mæla til, at tann tillutaða menningarkvotan lutfalsliga verður sett niður við umleið 20 %, og at reiðaríið - heimahoyrandi á Sandoynni - framvegis kann fiska menningarkvotu og avreiða tey 80%´ini til Hvalba.

Eg dugi ikki rættiliga at síggja hví avreiðingin til Hvalbiar skal fella burtur, vegna tess, at Skopun ikki vil taka ímóti.

Vísandi til omanfyri standandi, vænti eg at frætta aftur.

Virðingarmest

Jógvan P. Lassen, adv.
jpl@lawfirm.fo
tlf. 513996